

Frá vinstru: Wilhelm Petersen, Gunnar í Liða, Marner Jacobsen, Bjarni Olsen, Sofus Clementsen, Eyðfinn Reyðberg, Allan Skaalum, Oyvindur Brimnes, Peter Holm og Arnhold Hjelm Nielsen

bankunum. Turbulenta støðan hevði fyri knøppum ári síðan við sær, at stjórin í 11 ár, Wilhelm Petersen, mátti siga stjórasessin frá sær.

Á Smyril Line boðaði nevndarformaðurin, Klaus Kjærulff, brádliga frá í summar, at samstarvið við Peter Holm sum stjóra var endað. Endaða samstarvið minti meira um eina uppsøgn enn um eina sjálvvalda avgerð at fara, og hóast fjølmiðlarnir royndu at bora í málinum, komu teir ikki framá annað enn, at ósemja hevði verið millum stjóran og summar nevndarlimir.

### Órógv og gølur

Á Posta hevur seinastu árini verið ein øgiligur goragangur, tí nógv fólk eru uppsøgd, og umleggingarnar hava verið umfatandi. Miðdepil í rokinum var Sofus Clementsen, ið tók við sum stjóri har í 2006. Umfatandi ónøgd við hansara leiðslustíl tóktist ikki rína við stjóran, men brádliga herfyri boðaði hann so frá, at hann legði frá sær. Hann hevði brúk fyri einum *time-out*, tí tíðin á Posta hevði verið slítandi, segði hann.

Á Landssjúkrahúsinum valdaði friður og í fólki góður tokki, eftir at Allan Skaalum gjørdist stjóri har, kanska tí diplomati var hansara størsta dygd. Men so kom undan kavi, at útreiðslurnar til heilivág vóru vaksnar óvanliga nógv. Hóast stjórin tíðliga gjørdi landsstýrismannin varugan við, at eykaútreiðslur vóru á veg, og at hetta stóðst av serligum umstøðum, var landsstýrismaðurin við heilsumálum, Aksel Johannesen, eirindaleysur og sendi stjóran til hús.

Framhaldssøgan um byggigøluna í Hovi kostaði at enda eisini eitt stjóralív. Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki, ið hevði evstu eftirlitsskyldu við bygginginí, kom í so harðan andróður av skúladeplinum, m.a. tí stovnurin hevði latið landsstýriskvinnuni við skúlamálum, Helenu Dam á Neystubø, skeivar upplýsingar um byggikostnaðin, at Annika Olsen, landsstýriskvinna við innlendismálum, ongan annan møguleika sá enn at siga honum úr starvi.

Og júst sum hesi tíðindini vóru farin afturum, boðaði Gunnar í Liða, stjóri á Tryggingarfelagnum Føroyar, frá, at hann leggur frá sær 1. januar 2011. Hann valdi kærleikan fram um arbeiðslívið, segði hann um orsøkina við Portalin.

### Mistøkini kosta

Spurningurin er so, um tað er vorðið nærum óliviligt at vera stjóri, um stjórarnir eru verri nú enn fyrr, ella um tað kanska er vorðið móti, eitt nú hjá politikarum, at finna syndabukkar í málum, ið kunnu raka teir sjálvar. Verður hugt at málunum um teir 10 stjórarnar, ið eru farnir úr starvi síðan 2009, hómast nøkur viðurskifti, ið eru øðrvísi í dag, enn tey vóru fyrr, tá stjórarnir sótu meginpartin av lívinum.

Fráfarnu stjórarnir í Eik Banka vórðu uttan iva bidnir um at fara, tí bankin at enda gjørdist insolventur. Hevur tú staðið teg væl, verður tú ikki biðin um at fara, men gerst endin, at fyritøkan er um at lata lívið, og uppruddarar standa í gongini og skulu fáa fyritøkuna á føtur aftur, má gamla leiðslan fara. Tað fór hon so í Eik Banka. Kanska vóru reyð tøl á botnlinjuni í Norðoya Sparikassa og Atlantic Petroleum eisini orsøkin til, at aðrir stjórar sluppu at royna seg har.

Orsøkin til stjóraskiftið á TAKS stóðst av, at ovasti myndugleikin, Fíggjarmálaráðið, ikki sá seg ført fyri at loysa eina innanhýsis ósemju og tí gjørdi av at biðja topparnar fara heim. Kanska varð hetta gjørt, áðrenn málið menti seg til at gerast ein stórur trupulleiki fyri fíggjarmálaráðharran sjálvan. Í øllum førum vóru arbeiðsviðurskiftini vorðin so ónøktandi, at okkurt mátti gerast.

At Allan Skaalum og Oyvindur Brimnes vórðu uppsagdir, var beinleiðis úrslit av ministeriellu stýrisskipanini frá 1994, har landsstýrismenn sita við evstu ábyrgdini av tí, sum hendir á stovnum undir teimum. Aksel Johannesen helt, at meirútreiðslur til heilivág vóru nóg góð grund til at senda Allan Skaalum heim, hóast stjórin vísti á serligar umstøður sum orsøk til meirútreiðslurnar. Mest sannlíkt gjørdi landsstýrismaðurin hetta, tí hann óttaðist fyri at enda í somu støðu sum undanmaðurin í landsstýrissessinum, Hans Pauli Strøm, ið noyddist frá orsakað av meirnýtslu.

Annika Olsen, landsstýriskvinna, hevði ítøkiligar grundir at geva Oyvindi Brimnes boð um at fara. Landsverk var beinleiðis orsøk til, at Helena Dam á Neystabø gav løgtinginum skeivar upplýsingar, pengar vórðu útgoldnar av skeivari konto í sambandi við skúlan í Hovi, og skúladepilin sum heild var og er ein endaleys gøla. Tað fekk so avleiðingar. Hetta hevði tó verið rættiliga óhugsandi í 50'unum, 60'unum og 70'unum, tá Landsverkfrøðingurin nærum var eins maktfullur og landsstýrismenninir í kollegialu stýrisskipanini.

> At Allan Skaalum og Oyvindur Brimnes vórðu uppsagdir, var beinleiðis úrslit av ministeriellu stýrisskipanini frá 1994, har landsstýrismenn sita við evstu ábyrgdini av tí, sum hendir á stovnum undir teimum

> Á Posta hevur seinastu árini verið ein øgiligur goragangur, tí nógv fólk eru uppsøgd, og umleggingarnar hava verið umfatandi. Miðdepil í rokinum var Sofus Clementsen. Herfyri boðaði hann so frá, at hann legði frá sær

### Ov stórar broytingar

Fallið hjá stjóranum á Posta var rættiliga áhugavert, verður havt í huga, hvussu stórur hansara broytingarhugur var. Summir ráðgevarar í leiðslu siga, at um tú miseydnast sum stjóri teir fyrstu 100 dagarnar, er stórur vandi fyri, at tú miseydnast heilt. Nýggir stjórar vilja ofta fremja broytingar skjótt, men verður farið ov skjótt og ov harðliga fram, kann bakslátturin gerast so stórur, at tú bæði leggur teg út við starvsfólk, fakfeløg og fjølmiðlar.

Hetta tóktist at gerast trupulleikin hjá Sofusi Clementsen á Posta. Broytingarnar vóru nógvar, nógv fleiri, enn gomlu stjórarnir, ið sótu 30-40 ár í sínum sessum, høvdu framt upp á so stutta tíð. Kanska vóru broytingarnar á Posta neyðugar, tí stovnurin var ótíðarhóskandi. Kanska vóru allar broytingarnar ikki neyðugar og framferðin ov harðlig. Ið hvussu gjørdist bakslátturin so stórur, at stjórin at enda maktaðist og legði frá sær.

Fyrimunurin við, at nógvir stjórar eru farnir úr starvi í seinastuni, kann so vera, at fleiri mans við stjóraroyndum eru tøkir at seta í onnur leiðandi størv. Vanligt hevur ið hvussu er verið millum ráðharrar í øðrum londum, at fyri tí, um teir mugu siga ein ráðharrasess frá sær, merkir tað ikki, at teir ikki seinni kunnu fáa onkran annan ráðharrasess. Har ein starvsleiðin endar, byrjar sum kunnugt mangan ein onnur, og soleiðis má tað kanska at vera, nú stjórastarvið langt frá altíð gerst eitt lívsstarv.

## FAKTA

### Farnir úr starvi

**Síðan á sumri 2009 eru hesir stjórar farnir úr sínum sessum ella hava boðað frá, at teir fara:**

1. **Wilhelm Petersen** *Atlantic Petroleum*
2. **Gunnar í Liða** *Tryggingarfelagið Føroyar*
3. **Marner Jacobsen** *Eik Banki*
4. **Bjarni Olsen** *Eik Banki*
5. **Sofus Clementsen** *Posta*
6. **Eyðfinn Reyðberg** *Norðoya Sparikassi*
7. **Allan Skaalum** *Landssjúkrahúsið*
8. **Oyvindur Brimnes** *Landsverk*
9. **Peter Holm** *Smyril Line*
10. **Arnhold Hjelm Nielsen** *TAKS*